# Nú gongur niður á bakka hjá s

**Á fundi týsdagin legði Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe fram eina sonevnda roknskapargreining av fiskiflotanum fyri árini 1999 til 2003. Niðurstøðan er, at fiskiflotin hevur havt nøkur góð ár, harav árið 2001 var hitt besta, og síðan er gingið niður á bakka hjá stórum parti av flotanum**

FISKIFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Roknskapargreiningin, sum Rasmussen & Weihe hava gjørt, fevnir um meginpartin av fiskiflotanum. Við í greiningini eru fiskifør, sum eru omanfyri 110 tons ella hava eina maskinorku, sum er yvir 400 hk. Hetta svarar til flokkingina av fiskiskipum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Greiningin byggir í fyrsta lagi á almennu roknskapirnar hjá teimum feløgum, ið eiga skipini. Harumframt hava Rasmussen & Weihe útvegað sær upplýsingar um nettosølu, veiðinøgd og annað.

Útróðrarflotin er ikki við í greiningini, tí har eru bert fáir bátar, sum eru skipaðir í parta-ella smápartafeløg við skyldu at lata inn almennan roknskap.

Kanningin av fiskiflotanum er býtt upp í hesar vinnugreinar.

- pelagisk vinna
- rækjuvinna
- verksmiðjutrolarar
- partrolarar
- lemmatrolarar
- línuskip
- garnaskip
- onnur skip

– Í greiningini hava vit lagt dent á at lýsa gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki hesi 5 árini. Fyri at fáa eina heildarmynd av fiskivinnuni, hava vit eisini lagt tølini fyri allar skipabólkarnar saman, siga Rasmussen & Weihe.

Grannskoðarafelagið sigur, at tey við roknskapargreiningini hava lagt dent á at geva teimum, sum lesa frágreiðingina, møguleika fyri at gera sínar egnu niðurstøður. Taltilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymiskar hættir.

– Men vit kunnu staðfesta, at sera stórar broytingar eru farnar fram í tíðini frá 1999 til 2003.

## Upp og niður

– Sum heild hevur fiskiflotin havt eina støðuga framgongd frá 1999 til 2001, men árini 2002 og serliga 2003 hevur gingið afturá. Hetta er eina mest orsøkin til, at støðuga framgongdin í búskapinum er vend til eina afturgongd.

Grannskoðarafelagið vísir á, at greiningin fevnir ikki um 2004, men tað eru týðiligar ábendingar um, at hetta árið er verri enn 2003 hjá mongum skipum.

– Sambært Hagtíðindum fyri oktober 2004 er feskfiskaveiðan í virði minkað 10% fyrstu átta mánaðirnar í 2004 í mun til somu mánaðir í 2003. Lemmatrolarar og garnaskip hava ikki merkt niðurgongd í virðinum á fiskiveiðini í 2004, meðan partrolarar og línuskip hava merkt ávikavist 16% og 13% afturgongd í veiðivirði fyrstu átta mánaðirnar í 2004, sigur felagið.

## Pelagisk skip

Pelagisku skipini høvdu eitt framúr gott ár í 2001, men í 2002 er úrslitið fallið munandi – og í 2003 heldur afturgongdin fram.

– Tó má árið 2003 metast sum eitt nøktandi ár, og úrslitið hetta árið er tað triðbesta hesi fimm árini.

Grannskoðarafelagið sigur, at pelagiski flotin er væl konsolideraður og er annars væl fyri.

– Sambært teimum ábendingum, sum vit hava fingið, má roknast við, at pelagisku skipini hava havt enn eitt gott ár í 2004, sum svarar nøkulunda til árið 2003.

## Rækjuskip

Rækjuflotin hevur havt fleiri trupul ár á rað, og støðan var vánalig við árslok 2003.

– Tað er eisini alt, sum bendir á, at rækjuflotin hevur havt enn eitt vánaligt ár í 2004.

Grannskoðarafelagið vísir á, at okkurt skip er farið av knóranum í 2004, og okkurt annað skip er farið úr flotanum.

– Henda ikki munandi broytingar í rakstrinum, má roknast við, at rækjuflotin






*Fólk, sum eru aktiv í fiskivinnuni, bankafólk og onnur, sum í aðrar mátar varða av vinnuni, vóru við á fundinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*